# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
arni@sosialurin.fo

### Innrás í Somalia

Etiopia sendi í gjár hermenn inn í grannalandið Somalia at hjálpa stjórnini, sum er illa kroyst av muslimskum uppreistrarmonnum, sum hava tikið valdið í stórum parti av landinum.

Uppreistrarmenninir hava millum annað tikið høvuðsstaðin Mogadishu, og tí var stjórnin noydd at flýggja til ein bý stutt frá etiopiska markinum. Tað ljóðar, at teir fyrstu etiopisku hermenninir komu til býin í gjár, men tað er ikki greitt, hvussu nógvir etiopisker hermenn eru komnir inn um markið.

Viðurskiftini millum Etiopia og Somalia hava verið spent síðani kríggið teirra millum seinast í sjeytiárunum, men núverandi somaliski leiðarin, Abdullah Yusuf, hevur kortini dugað at havt gott samband við etiopisku stjórnina. Tað ljóðaði longu fyri einum mánað síðani, at etiopiskir hermenn vóru komnir til Somalia, men ta ferðina vórðu tíðindini avsannað.



### Saddam kann fáa deyðadóm

Í dag byrjaði enn eitt rættarmál ímóti fyrrverandi irakska forsetanum Saddam Hussein, og verður hann funnin sekur, kann hann verða dømdur til deyða.

Hesaferð er Saffam ákærdur fyri hópdráp ímóti kurdunum har norðuri í Irak í 1987 og 1988. Í álopinum á kurdarnar brúkti irakski herurin eiturgass, men verjarnir hjá Saddam siga, at álopið var lógligt, tí kurdarnir høvdu hjálpt Iran í krígnum við Irak. Umframt Saddan eru seks fyrrverandi heryvirmenn ákærdir í sama máli. Ein teirra er systkinabarn hansara Ali Hassan al-Majaf, ið fyrr varð róptur “Kemiski Ali”.

Saddam Hussein er eisini ákærdur fyri at hava givið herinum boð um at skjóta 148 fólk í bygdini Dujail í 1982 beint eftir, at ein morðroynd ímóti honum var miseydnað. Bæði hetta málið og gassálopið á kurdarnar kunnu enda við deyðadómi.

Teir seks fyrrverandi heryvirmenninir kunnu fáa somu revsing, verða teir funnir sekir, skrivar AP.

### Hiti og eldur í Grikkalandi

Tað hevur verið sera heitt í Grikkalandi teir seinastu dagarnar, og sum so nógva aðrastaðni í syðra parti av Evropa hevur tann nógvi hitin elvt til skógareldar.

Í gjár kom hitin upp í heili 42 stig, og veðurmenninir siga, at lítil broyting verður í hitalagnum teir næstu dagarnar. Heilsumyndugleikarnir senda javnan ávaringar út, og í Athen hava skúlar, sjúkrahús og fleiri aðrir almennir bygningar fingið køliskipan, har fólk kunnu leita sær skjól undan sólini.

Nærhendis Athen og longri suðuri í landinum stríðast stór sløkkilið við fleiri skógareldar, men í gjár varð sagt, at sløkkiliðini høvdu fingið tamarhald á fleiri eldum.

# Ísraelskir hermenn misnøgdir við herin



*Ísraelskir hermenn á veg úr Libanon. Fleiri teirra kæra seg nú um, at fyrireikingin var tilvildarlig, og at teir høvdu ov lítla venjing*

**Hermenninir kendu seg ofta ráðaleysar í Libanon, útgerðin var í vánaligum standi, og eykahermenninir høvdu alt ov lítla venjing.**

ÍSRAEL

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Ísraelski herurin hevur sjáldan verið fyri so hvøssum atfinningum frá sínum egnu sum aftan á kríggið við Hizbollah í Suðurlibanon.

- Vit bardust til onga nyttu. Vit tóku onkur hús, men stutt eftir tók Hizbollah tey aftur, sigur ein hermaður við blaðið Maariv. Hann var fleiri vikur í Suðurlibanon og greiðir frá, at hermenninir vóru alt ov illa kunnaðir, teir høvdu ov lítla venjing og kendu ikki útgerðina nóg væl. Í fleiri førum skutu ísraelskir hermenn eftir hvør øðrum, tí teirra leiðarar tosaðu ikki saman.

- Vit bardust í blindum og mundu skotið hvør annan, sigur hermaðurin við Maariv.

Undir krígnum í Libanon varð ísraelski herurin fleiri ferðir tikin á bóli. Tað vísti seg, at Hizbollah gjørdi nógv harðari mótstøðu, enn herleiðslan hevði væntað, og harafturat hevði Hizbollah nútímans vápn.

Fleiri ísraelskir hernaðarserfrøðingar hava funnist at herleiðsluni, tí hon setti sítt álit á flogvápnið og tí drálaði alt ov nógv við at senda hermenn inn í Suðurlibanon. Serfrøðingarnir halda eisini, at ísraelska herleiðslan undirmetti Hizbollah, og at Ehud Olmert, forsætisráðharri, setti sær óverulig mál, tá hann segði, at herurin skuldi berja Hizbollah niður.

### Ov lítla venjing

Tæt harðastu atfinningarnar at herleiðsluni koma frá monnum úr eykaherinum, sum blivu sendir til Libanon. Í Ísrael er tað so, at menn skulu gera trý ára hertænastui, tá teir fylla 18 ár, men teir halda fram í eykaherinum, líka til teir fylla 40.

Í seinastuni hava ísraelsku bløðini prentað ein hóp av atfinningum frá monnum í eykaherinum, sum kæra seg um, at teir vóru alt ov illa fyrireikaðir til kríggið. Summir siga, at vápnini virkaðu ikki, sum tey áttu, og at teir fingu ikki ta neyðugu útgerðina. Haraftuat læra teir seg um vantandi venjing. Eitt nú sigur ein av monnunum, at hann hevði ikki tveitt eina granat í 15 ár, tá hann brádliga fekk boð um at fara til Libanon.

Blaðið Yediot Ahronot skrivar, at í einstøkum førum sýtti herleiðslan fyri at senda tyrlur eftir særdum hermonnum, tí hon var bangin fyri, at Hizbollah fór at skjóta tyrlurnar niður. Tað hevði við sær, at nakrir hermenn doyðu, tí teir fingu ikki hjálp, skrivar blaðið.

# Vísa ikki “United 93”

“United 93”, sum er nýggjur filmur um atsóknirnar at USA tann 11. september í 2002, hevur fingið góð ummæli síðani frumsýningina seinasta fríggjadag, men flogfeløgini eru ikki serliga fegin um filmin.

Skandinaviska SAS hevur boðað frá, at filmurin verður ikki vístur umborð á tess flogførum.

- Fólk skulu hugna sær, tá tey flúgva við okkara flogførum. Harafturat nærkast september, og tað hevði verið skeivt at víst filmin umborð á flogførunum, sigur ein talskvinna hjá SAS við forbruker.no.

Tað sama sigur amerikanska flogfelagið Continental. Ein talsmaður hjá felagnum sigur við AP, at felagið vísir vanliga ikki filmar, sum snúgva seg um flogvanlukkur.